# Fátæksligur jólam



*Gomul mynd av Slættanesi. Helst tikin einaferð undir seinna heimsbardaga*

**JÓLAPRÁT**
*Edvard Joensen*

At fáa feskt til jóla var tann stóri dreymurin. Slapst á flot tollaksmessudag, vóru jólaknettini bjargað. Og tað dámdi fólki best at fáa til døgurða jóladag. Men var uppiløga, var gamal havhestur ella saltgrind etin til døgurða á jólum.

– Soleiðis var á Slættanesi, í árunum undan seinna heimsbardaga og har á leið, greiðir Jørmund Skoradal frá. Hann er føddur á Slættanesi í 1934 og uppvaksin har. Jørmund býr í dag í Sandavági.

Slættanes hevur ikki verið so nógv øðrvísi enn aðrar bygdir í landinum í teirri tíðini. Har búði fólk og fekst við tað arbeiðið, sum var har at gera. Menn vóru skipsmenn, og konurnar vóru heima og høvdu nokk at takast við. Børnini vóru nógv. Eitt skifti um krígstíðina seinnu búðu umleið 70 fólk á Slættanesi, og av teimum vóru eini 30 skúlabørn, minnist Jørmund Skoradal.

## Jólahald í felag

Á Slættanesi vóru fólk savnað annan jóladag til jólatræshald í skúlanum, greiðir Jørmund frá.

Tað var ikki so, at hvørt húsið hevði sítt jólatræ. Tað var verri enn so. Og viðhvørt varð nóg ringt at fá eitt jólatræ, sum kundi setast upp í skúlanum til alla bygdina at savnast um.

Eitt árið minnist hann, at einki jólatræ fekst. Helst hevur tað verið undir krígnum, tí tá manglaði so mangt, og ivaleyst hevur jólatræ ikki verið tað fyrsta, sum sent varð við farmaskipinum úr Bretlandi.

Á Slættanesi var ikki annað at gera, enn so mangur annar hevði roynt. Teir funnu eitt kustaskaft, sum teir negldu nakrar »greinar« uppá. Og so var at fáa klætt hetta góða, eftirgjørda jólatræ. Teir fóru við posa í hagan at royta lyng. Og tað bar væl til. Óført jólatræ á Slættanesi, minnist Jørmund.